

*Óla Kristian í Skálabúðini var nógv í Hesti. Her saman við konuni Honnu*



*Jakku og Ingibjørg á yngri árum*

donskum við foreldrini. Andreas í Vágsbotni og William tosaðu eisini danskt sínamillum.

## Mina í Hesti

Tað merktist ikki nógv til kríggið í Hesti. Men har kom eina ferð ein so óalmindiliga stór mina. Eingin visti av henni fyrrenn ein morgun eftir eitt ódnarveður, táið minan hevði lagt seg millum tveir stórar klettar. Tað vóru boð send eftir bretska hervaldinum. Teir komu út og søgdu, at minan kundi altíð bresta. Men tá rýmdi alt fólkið heilt norður í bygdina, til minan var óskaðiliggjørd.

## Gift til Gøtu

Eg varð so gift við Óla Jákup Hansen frá Gøtugjógv, Jakku hjá Hans bónda, sum hann varð kallaður. Hann átti eina systir í Havn, Katrina hjá Talis.Ein sonur teirra var Carl, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag. Jakku hevur vitjað systrina, og tá eru vit komin at kennast.

Jakku var einkjumaður. Hann hevði verið giftur við Thoru, dóttir Sofíu Johonnu og Tummas í Funningsfirði, men hon var deyð í 1943 av tuberklum frá trimum børnum.

Jakku var so keddur av, at børnini vóru so langt burtur. Turid og Árant vóru bæði norðuri í Funningsfirði, og hetta var langt burtur tá í tíðini. Heðin búði hjá ommuni og abbanum, Hans og Biritu.

Annars var tað ikki nakað, sum eg droymdi um, at blíva bóndakona. Eg komi so til Gøtu í 1946, 31 ára gomul, og havi tískil nú verið í Gøtu í meira enn 60 ár.

Turid kom beinanvegin til Gøtu, meðan Árant kom nøkur ár seinni. Honum dámdi so væl at ganga í skúla har, sum var í húsunum hjá ommuni. Men hann gekk so síðsta árið í skúla við Gøtugjógv, har hann eisini býr nú.

Eg fall væl til í Gøtu, men eg saknaði tað góða samband, sum vit í Hesti høvdu havt við Havnina. Úr Hesti kundi altíð sleppast til Havnar. Hetta var eitt sindur øðrvísi í Gøtu, har ein skuldi passa seg til rutuna, sum ikki altíð var so lagalig.

Tað lá heldur ikki so væl fyri at ferðast, tá ein var bundin at eini kúgv. Børnini gingu í skúla, og tað var eisini meira bundisligt. So viðhvørt longdist eg eitt sindur suður aftur til Havnar. Har hevði eg jú verið so nógv, eisini alla krígstíðina.

Jakku fór burtur til skips beinanvegin. Hetta var beint í tí stóra kavanum í 1947. Tá stóð ein kúgv í kjallaranum hjá okkum. Seyðurin varð koyrdur inn. Sumt varð koyrt inn í hoyggjhúsið, og annað varð koyrt inn í kjallaran hjá okkum, og har tað annars var pláss fyri at bjarga hesum góða seyði. Hetta var sera strævið eisini at hava neyt og seyð saman.

Hetta var eitt slíkt stríð, at eingin trýr tí. Tað skuldi jú dragast hoyggj til øll hesi kríatúr. Ikki koyrdu vit seyðin út aftur fyrr enn 11. apríl. Kavin lá í samfullar 11 vikur. Tað var einki, sum at kavarudding tá í tíðini. Hetta gjørdi tað ikki lættari.

Tá sóu vit berar plettar í haganum. Tá koyrdi gamli, Hans, seyðin út, tí vit kundu ikki brúka meira hoyggj til seyðin, um vit skuldu behalda neytini.

Men tað var kortini so einastandandi gott veður í tí kavanum. Tað byrjaði hvønn seinnapart av kava so spakuliga, og tað var



*Ingibjørg hevur búð í góð 60 ár við Gøtugjógv, har hon hevur verið væl umtókt av sínum bygdarfólki*

deiligt sólskin hvønn morgun. Jakku segði eisini, at hann hevði ongantíð verið á Suðurlandinum, at tað hevði verið so gott veður. Hann lá av landnyrðini alla tíðina. Jakku var við Kyrjasteini tað árið.

Jakku var annars bæði við Boðasteini og Kyrjasteini hjá Haraldsen í Fuglafirði. Hann var annars nógv við Óla Hans Olsen sum skipara. Hann var ættaður frá Gøtugjógv, men giftist til Syðrugøtu.

Jakku helt eisini nógv av Óla Hans, sum hann helt vera sera gløggan á sjónum. Eisini fiskaði hann væl.

Nu eru tað eini 20 ár síðan, at Jakku doyði.

## Tá ið tað spøkti hjá Hansi

Tað hevur verið fortald ein stuttlig søga um Hans, pápa Jakku. Hann var gravari í Gøtu. Eina ferð var eitt slíkt brim í Syðrugøtu, at ein gamal kirkjugarður kom undan saman við einum hópi av mannabeinum.

Hans fór yvir til Syðrugøtu og koyrdi beinini í ein posa. Posin skuldi so berast yvir í kirkjugarðin í Norðragøtu, har beinini skuldu jarðast. Men tað var blivið seint, og veðrið var framvegis so ringt, at Hans tók sekkin til hús og setti hann i hjallin til dagin eftir.

Veðrið var framvegis líka ringt seinni um kvøldið, og tað regnaði nakað so ræðuligt. So eina ferð nú bankar uppá dyrnar. Tað var nærum óhugsandi, at nakar fór út í slíkum veðri, so Hans verður sum rímuligt er illa við. Men han letur sum einki. Men tað bankar harðari og harðari. Eina ferð rópar Hans: "Hvør í Guds garði er hetta." "Hetta er Ívar," svarar ein rødd. Hans kendi ongan Ívar, og tað er kanska skoytt uppí søguna, at Hans skuldu rópa: "Beinini eru í hjallinum, og lykilil er undir bitanum." Men tá vísti tað seg, at hetta var ein kvívíkingur, sum Jakku hevði siglt saman við, og sum av eini ella aðrari orsøk var endaður í Gøtu í hesum illveðrinum. Hann visti sær eingi onnur ráð enn at leita Jakku upp.

Hans fortaldi fyri mær, at tá ið stakittið var gjørt uppi á Lorvíksfjalli, bar hann alt jarnið niðan. Hann nýtti ein dag til tað, so hetta hevur verið eitt rættuligt tørn, tí tað vóru nógvir túrar. Hans var kropsliga sera sterkur. Kona hansara Birita var úr Lorvík.

Mamma varð 86 ár tá ið hon doyði í 1963. So hon sat einkja í eini 44 ár. Eg eigi framvegis eina systirdóttir og tveir systirsynir í Hesti. Annar av teimum býr framvegis í húsinum hjá okkum. Ein systir teirra er giftur í Havn og ein dóttir í Gásadali.

## Tøkk til Ingibjørg

Vit vilja takka Ingibjørg fyri hennara frásøgn. Hóast sína truplu lívsbyrjan er hon eitt sera positivt menniskja. Hennara grannar við Gøtugjógv taka til, hvør merkiskvinna hon er, og tað sama siga tey um hana á Gøtubrá

**Rætting til myndatekst**
Myndin í fyrra partinum, har tað stóð, at tað var Ingibjørg og systir hennara, skal vera, at tað er Ingibjørg og systirdóttir hennara Dagny, sum býr í Gásadali.

**Komandi partur**
Komandi tvær Miðvikur verða um høvuðsmálini á vitjanini hjá Smyril Line í Íslandi, nevniliga Bakkafjørðin og kirkugarðin á Seyðisfirði við hansara føroysku gravum. Fyrra greinin verður um útróður hjá føroyingum á Bakkafjørðinum

Sosialurin